Ársfrágreiðing 2024

Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og Vinnumálum, samsvarandi vinnupolitikki Landstýrsins, staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyrinevnda virksemi, røkir Vinnuframi hesi øki:

- Umsiting og játtan hjá Filmshúsinum
- Umsiting og játtan hjá Tónleikaútflutningsstovuni
- Umsiting og játtan av Endurgjald til skipasmíð
- Umsiting og játtan av Endurgjald til filmsverkætlanir
- Umsiting og játtan av Stuðul til tónleikavinnu
- Játtan hjá Íverksetarahúsinum

Vinnuframi eigur og rekur eisini bygningin á Hoyvíksvegi 51, Tórshavn, sum verður leigaður út til granskingarparkina iNOVA.

Harumframt húsast skrivstovan hjá NATA, North Atlantic Tourist Association, í skrivstovuhølunum hjá Vinnuframa.

Árið 2024

Endamálið hjá Vinnuframa er at veita fíggjarligan stuðul til nýskapandi vinnuligar verkætlanir, sum skapa eitt meiri fjøltáttað og burðardygt vinnulív.

Stuðulsskipanirnar í 2024 vóru ráðgeving, menning, søla og heildarverkætlanir. Stýrið raðfesti tøkni og burðardygd í 2024.

Vinnuframi hevur í 2024, umframt kjarnuøkið í grunninum, havt ábyrgd av játtan og umsiting hjá Filmshúsinum og Tónleikaútflutningsstovuni. Sambært umsitingaravtalunum er árliga umsitingargjaldið tkr. 100 fyri hvønn stovn í 2024.
Orsakað av, at játtanirnar til hesar stovnar eru øktar munandi, er virksemið økt samsvarandi. Tískil eru umsitingaravtalurnar endurskoðaðar. Nýggja umsitingaravtalan, galdandi frá 1. januar 2025 hjá Filmshúsinum, fevnir nú eisini um stuðulsskipanina Endurgjald til Filmsvinnu og árliga gjaldið er hækkað til tkr. 225. Somuleiðis fevnir umsitingaravtalan, galdandi frá 1. januar 2025 hjá Tónleikaútflutningsstovuni, eisini um stuðulsskipanina Stuðul til tónleikavinnu og árliga gjaldið er hækkað til tkr. 225.

Virksemið er eisini alsamt vaksandi innan skipasmíð í Føroyum, bæði til heimamarknaðin, norðurlendska marknaðin og Grønland. Arbeiðsbyrðan hjá Vinnuframa er økt samsvarandi. Sambært avtalu við Uttanríkis- og Vinnumálaráðið er árliga umsitingargjaldið fyri umsiting av Endurgjald til skipasmíð tkr. 50.

Í desember 2019 flutti skrivstovan hjá NATA úr Vinnuhúsinum inn á skrivstovuna hjá Vinnuframa. Endamálið hjá NATA er at fremja samstarvið innan ferðavinnu millum Grønland, Ísland og Føroyar. NATA veitir stuðul til samstarvsverkætlanir innan ferðavinnumenning og -marknaðarføring og ferðastuðul til skúlar, ítróttarútferðir og mentanarlig tiltøk millum londini. Sambært samstarvsavtalu millum Vinnuframa og NATA varð gjaldið tkr. 375 í 2024 fyri at hýsa skrivstovuni hjá NATA.

Vinnuframi hevur ábyrgd av at røkja bygningin á Hoyvíksvegi 51, sum er leigaður út til granskingarparkina iNOVA. Leiguinntøkan fyri 1.420 fermetrar var tkr. 234 í 2024. Við støði í marknaðarprísi fyri húsaleigu av vinnubygningi á kr. 930 fyri hvønn fermetur, veitti Vinnuframi sostatt stuðul til iNOVA á tkr. 1.087. Leiguinntøkan verður í stóran mun nýtt til umvælingar og ábøtir, sum í tíðarskeiðnum 2020-2024 vóru tkr. 755. Vinnuframi fekk játtað sjálvbodna mvg-skráseting frá Taks í 2024.

Í 2011 varð Løgtingslóg nr. 59 frá 26. mai 2011, um at nýta part av stovnsfænum hjá Vinnuframa til at innrætta høli til granskingarsetur, viðtikin. Bygningurin hjá Vinnuframa varð í 2012 umbygdur til endamálið fyri umleið 10 mió. kr. Starvsstovutól fyri umleið 6,6 mió. kr. vórðu eisini fíggjað við stovnsfæi frá Vinnuframa.

iNOVA leigar í dag út til vinnufyritøkur og almennar stovnar, sum hava atgongd til skrivstovuhøli og nútímans starvsstovur og starvsstovutól. Eisini kunnu fyritøkur, granskarar og privat fólk leiga køkin, ið er løggildaður av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Leiðarin í Vinnuframa bleiv fullgildigur limur í stýrinum í februar 2024. Fimm fundir vóru hildnir í árinum. Ein fundur varð hildin í Stockholm, ein varð hildin í Oslo og tríggir fundir vóru hildnir umvegis Teams.

Politiska skipanin í Føroyum gjørdi í 2023 avtalu um luttøku í Horizon Europe. Vinnuframi er National Contact Point fyri hesi øki undir Horizon Europe:

- The European Innovation Council (EIC) and European Innovation ecosystem
- European Institute of Innovation
- Technology og Digital, Industry and Space

Í hesum sambandi hevur Vinnuframi tætt samstarv við Granskingarráðið, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av føroysku avtaluni við ES um Horizon Europe stuðulsskipanirnar.

Tonik, árliga altjóða ráðstevnan fyri íverksetarar og vakstrarfyritøkur innan tøkni, fór av bakkastokki í Sjóvinnuhúsinum 3. mai 2024. Endamálið við Tonik er at geva føroysku tøkni vinnuni og íverksetum ein kveikjandi og savnandi pall, har møguleiki er fyri at fáa íblástur frá fremstu føroysku og útlendsku serfrøðingunum, royndum fyritøkum, íverksetum og íleggjarum.

Fyrilestrarhaldarar úr eitt nú Føroyum, Danmark, Íslandi, Svøriki, Hálandi, USA, Onglandi og Finlandi høvdu framløgur á trimum pallum um nýggjastu kósirnar innan tøkni, nýskapan og íverksetan. Møguleiki var eisini fyri at luttaka á verkstovum og síggja fyritøkur kappast um bestu framløguna fyri íleggjarum.

Fyritøkur, bæði føroyskar og útlendskar, og fremstu listafólk okkara vístu fram teirra nýskapandi loysnir og kreativu tilgongd. Tað serliga við Tonik er samanrenningin millum skapandi vinnuna og tøkni í óhátíðaligum estetiskum umhvørvi, sum skapar bestu karmarnar fyri nýhugsan.
Íleggjarar og nýskapandi fyritøkur bjóðaðu inn í básar/loungir á øllum fimm hæddum í SILO.

11. og 12. september høvdu Vinnuframi, Hugskotið, Íverksetarahúsið, Framtak og Uttanríkis- og Vinnumálaráðið ein bás á ráðstevnuni 'TechBBQ' í Keypmannahavn, sum liður í at fremja tøkni-vinnuna í Føroyum. Umframt vinnuframaskipanina luttóku tøkni fyritøkurnar Flowcore, Lunnar og Intra. Eitt av høvuðsendamálunum við básinum var eisini at marknaðarføra Tonik 2025.

46 umsóknir vórðu viðgjørdar í 2024 í mun til 45 umsóknir í 2023. Søkt varð um tkr. 7.999 í 2024 í mun til tkr. 6.491 í 2023.
Í stuðli vórðu í 2024 játtaðar tkr. 1.990 til 24 verkætlanir í mun til tkr. 1.894 til 21 verkætlanir í 2023. Afturførdur stuðul varð tkr. 609 í 2024.

Rentan tann 31. desember varð 7,29% í 2024, sum, aftaná umsitingargjald á 0,1%, svarar til tkr. 1.976 í mun til tkr. 1.706 í 2023. Gjaldførið í Landsbankanum 31. desember 2024 er tkr. 29.456.

Upprunaliga var ætlanin, at raksturin hjá Vinnuframa í stóran mun skuldi verða fíggjaður við rentuinntøkunum av stovnsfænum. Rentan í peningastovnunum í Føroyum hevur tó verið avmarkað ella negativ seinastu árini. Vinnuframi hevur tí flutt meginpartin av tøka peninginum í Landsbankan, sum setur pengarnar í virðisbrøv.
Virðisbrævamarknaðurin hevur verið óstøðugur seinastu árini og hevur tískil stóra ávirkan á tøka peningin til stuðul ár um ár. Rentan er sostatt ein sera óvissur faktorur í rakstrinum og kann, í besta føri, verða eitt gott íkast til raksturin og stuðulsjáttanina og, í ringasta føri, verða orsøk til eitt munandi rakstrarundirskot. Hendan støðan varð aktuel í 2022 tá negativa rentan førdi til eitt negativt flutt úrslit á -tkr. 1.476. Ein stórur partur av rentuni í 2023 er tískil brúkt til at javnviga negativa flutta úrslitið í 2022. Úrslitið varð, at stuðulsjáttanin aftur í 2024 varð lægri enn vanligt.

Vinnuframi er einasti grunnur í Føroyum, ið kann játta stuðul til allar vinnugreinar. Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar á stýrisfundi átta til níggju ferðir um árið. Áhugin fyri menning, nýskapan og útflutningi til altjóða marknaðin er stórur, bæði hjá íverksetarum og meira etableraðum

fyritøkum. Játtanin hjá Vinnuframa var 3 mió kr. í 2024. Hetta er ein lækking á tkr. 200 í mun til 2021.

Mett verður ikki, at játtanin fylgir við gongdini í samfelagnum og tørvinum á fígging. Tískil er talan um fleiri áhugaverdar størri verkætlanir, sum stýrið bert kann veita avmarkaðan stuðul til. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri menning, nýskapan og vøkstri í Føroyum.

Framtíðin

Tøkni og burðardygd verður framvegis raðfest i 2025.

Í viðgerðini av umsóknum um stuðul, verður dentur lagdur á, at verkætlanirnar eru nýskapandi og at tað er eitt toymi við hóskandi førleikum, sum kann tryggja, at eitt búskaparligt burðardygt virksemi við vakstrar- og útflutningsmøguleikum kann fremjast. Í hesum sambandi er tað ein fyrimunur, at handilsmodellið er væl hugsað ígjøgnum áðrenn farið verið í gongd, og at verkætlanin hevur jaliga ávirkan á vinnulívið sum heild í Føroyum.

Fyri at røkka málinum um, at allir føroyingar skulu kenna til Vinnuframa og Vinnuframskipanina sum heild, er Vinnuframi fús at luttaka tá bjóðað verður til viðkomandi tiltøk. Lýst verður regluliga á netmiðlunum og sosialu miðlunum.

Góða samstarvi millum stovnarnar í vinnuframaskipanini, til fyrimuns fyri íverksetararnar, mennist alsamt. Aktørarnir í Vinnuframaskipanini fara at samstarva um at skipa fyri fleiri spennandi tiltøkum í 2025.

Fyri at fylgja upp upp á verkætlanirnar, fer Vinnuframi at vitja fyritøkur, sum eru komnar á mál við teirra verkætlan. Samstundis verða stutt tíðindi og filmsbrot av virkseminum framleidd og løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuframa.

Hagtøl fyri seinastu fimm árini



	2020	2021	2022	2023	2024	Samanlagt
Ráðgeving	90	163	110	60	178	**601**
Menning	1.973	1.374	1.226	1.220	910	**6.703**
Søla	620	647	1.027	419	591	**3.304**
Heildarverkætlanir	407	300	160	195	230	**1.292**
Í alt	**3.090**	**2.484**	**2.523**	**1.894**	**1.909**	**11.900**